Skála-EB/Streymur:

Trýstið liggur á skálamonnum

Nýggi venjarin Hans Jákup Andreasen, fyrrverandi hjálparvenjarin og nýggi ábyrgdarmaðurin á Skála, heldur ikki, at tað er ómøguligt at fáa øll stigini í morgin

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Skálamenn eru undir hørðum trýsti, nú teir taka ímóti EB/Streymi, og ein sigur má mest sum metast sum eitt krav

Í næstsíðsta umfarinum fer Skála at fáa vitjan av TB. Tað hevur verið roknað við, at tann dysturin fór at verða rættuliga avgerandi fyri, hvat av hesum báðum liðum skal flyta beinleiðis niður. Men í morgin skal TB spæla í Vági, og um tvorámenn vinna oyggjauppgerðina, og um Skála samstundis einki fær á heimavølli í oyggjauppgerðini ímóti EB/Streymi, so kann tað fara at verða so, at úrslitið í næstsíðsta umfarinum ikki fær so stóran týdning, sum tað annars hevur verið roknað við.

Tí er tað rættuliga avgerandi hjá skálamonnum, at teir vinna ímóti EB/-Streymi. Og nýggi venjarin, Hans Jákup Andreasen, heldur, at tað er ikki ómøguligt:

– Vit mugu vinna, og vit áttu at havt nóg gott fólk og lið at megna tað, sigur Hans Jákup, sum hevur havt ábyrgdina fyri venjingunum tær báðar síðstu vikurnar. Frammanundan venjaraskiftinum var hann hjálparvenjari, og vit hava skilt á lagnum, at teir í nevndini hjá Skála skuldu brúka tíð til at sannføra hjálparvenjaran um, at hann skuldi taka ábyrgdina á seg.

– Eg havi búð niðri í seks ár. Har fekst eg ikki við fótbólt, og tað var ikki ætlanin at fara uppí aftur soleiðis, men nú er tað, sum tað er, og vit fara at royna at fáa nakað burturúr. Tað verður torført, tí liðið hevur ikki vunnið í 1. deild, men spælararnir vita, at hetta høvið er eitt tað besta, sum er eftir, sigur Hans Jákup Andreasen.

Á liðnum hjá honum eru tríggir av teimum, sum hava verið við fyrr í summar, ikki tøkir. Teir eru Dánial Hansen og Bárður Danielsen, sum hava trupulleikar við fótliðunum, og Marius Joensen, sum er fluttur til Danmarkar í útbúgving-arørindum.

Hans Jákup hevur áður verið venjari hjá EB/-Streymi, men hann sigur seg ikki kenna nakað serligt til liðið, sum teir nú spæla við:

– Eg vandi teir fyrsta árið, sum teir høvdu felagslið millum EB og Streym. Tað var í 1993, og teir høvdu lið í 2. deild og unglingalið. Frá tí liðnum er tað bara Jákup Martin Joensen, sum framvegis spælir í EB/-Streymi, sigur Hans Jákup.

Tað gekk væl hjá teimum. EB/Streymur endaði næstfremst og flutti beinleiðis upp saman við NSÍ, sum vann deildina.

Nøgdir við javnleik

Hjá EB/Streymi er liðformaðurin, Ronnie Samuelsen, leikbannaður fyri aðru ferð í ár. Tað hevur eisini verið ivasamt við Sorin Anghel. Hann hevur drigist við ein skaða í lærinum. Tá KÍ var á Eiði næstsíðsta mánakvøld, spardu teir hann. Sorin hevur gingið til viðgerð, og hann hevur ikki vant nakað serligt:

– Vit rokna við, at hann verður við í morgin, sigur Trygvi Mortensen, sum er venjari hjá EB/Streymi.

Og hvussu roknar tú við, at tað fer at ganga?

– Skálamenn hava trýstið á sær. Eg rokni við, at teir fara at leypa á, og eg rokni við, at teir fara at arbeiða nógv, nú teir skulu vísa nakað fyri nýggja venjaranum. Higartil hava teir fingið fýra javnleikir. Um tað eisini endar javnt ímóti okkum, so kunnu vit væl liva við tí úrslitinum. Men spurninugrin er, um teir kunnu liva við javnleiki. Støðutalvan sigur, at teir verða noyddir at fara eftir sigrinum. Tað passar okkum væl, sigur EB/Streyma venjarin.

B36-KÍ:

Bert sigurin telur

Taparin í Gundadali sunnudagin má siga farvæl við seinastu vónina um meistaraheitið

UPPTAKT
Jákup Mørk

Bæði B36 og KÍ hanga framvegis við í oddastríðnum, men í øllum førum annar parturin fellur frá hetta vikuskiftið

Hjá mótstøðuliðunum báðum í Gundadali hevur tað fyri tað mesta gingið framá seinastu nógvu dystirnar. Bæði B36 og KÍ fingu eina heldur laka byrjan upp á kappingarárið, og í báðum førum mundi tað vera so, at viðhaldsfólkini í hvussu so er høvdu avskrivað alla vón um gullmerki, tá fyrsti tríðingurin av kappingini var lagdur aftur um bak.

Síðani er tó verulig gongd komin á hjá báðum pørtum. KÍ hevur fingið fult burtur øllum dystum eftir summarsteðgin, og teir hava ikki roynt at tapt landskappingardyst, síðani teir í fjórða umfarinum fóru av Svangaskarði eftir dystin móti B68.

B36 hevur somuleiðis fingið fult burtur út øllum eftir summarsteðgin, men teir kunnu tó ikki leita heilt so langt eftir seinasta tapinum. Her var tað í níggjunda umfarinum, tá teir vitjaðu í Vági.

Hava møguleikan

Góða gongdin seinastu tíðina hevur fyri báðar partar viðført, at tey enn hava møguleikan at leggja seg út í oddastríðið, men skal hetta eydnast, so er alneyðugt, at øll trý stigini fáast til høldar í Gundadali. Somikið einfaldar eru treytirnar.

Hjá B36 tykjast teir heldur ikki ivast í, at hetta fer at bera til. Seinastu vikurnar hevur nógv frávera merkt liðið, og tó at hetta eisini hevur verið galdandi undir seinastu góðu vikuna, so hevur tað ikki havt nakað við skaðar at gera hesaferð. Fýra av B36 leikarunum vóru nevnliga partur av frálíka úrslitinum móti Skotum á Svangaskarði. Annars hevur allur hópurin sum skilst verið til venjingarnar, og tað merkir so, at Piotr Krakowski hevur ein positivan trupulleika, tá hann skal seta liðið, tí einki er at ivast í, at onkur verður vónbrotin av einum plássi á beinkinum.

Hjá KÍ er støðan mest sum álíkt henni hjá B36. Nakrir leikarar vóru burtur frá í vikuni, tí teir eru við í landsliðshópinum hjá Henrik Larsen, men í aðrar mátar hava allir vant við fullari ferð í vikuni. Allan Joensen var leikbannaður, tá KÍ vitjaði á Eiði, men hann er tøkur aftur, og so verður spennandi at síggja, hvussu Kurt Mørkøre fer at liðið hesa ferð. Eitt nú tykist spennandi at vita, hvørt venjari nfer at gera nýtslu av sær sjálvum ella Harley Bertholdsen frá fyrsta bríksli. Báðir hava teir fyri tað mesta byrjað dystirnar á beinkinum í seinastuni, men við avrikunum, sum teir hava sýnt, tá teir eru komnir inn, er spurningurin helst, um tað ikki rættvísgerð eitt pláss millum teir fyrstu ellivu.

GÍ-B68:

Toftamenn í fríum falli

Seinastu vikurnar eru toftamenn av álvara dottnir burtur ímillum, og verður talan aftur um tap í Gøtu, eru allar vónir um heiðursmerki burtur

UPPTAKT
Jákup Mørk

Tað hevur gingið av skriðjuni til hjá B68, síðani summarsteðin. Alla fyrru kappingarhálvu vóru teir við til at mynda oddin í landskappingini, men frá at vera biðil til heiðursmerki, er liðið seinastu tríggjar vikurnar »degraderað« til eina miðalvøru í bestu deildini.

Hóast tað sær svart út, so kunnu toftamenn tó framvegis skapa eitt sindur av spenningi í heiðursmerkjastríðnum, men tað krevur so, at trý stig fáast til vega sunnudagin, og tað verður helst alt annað enn lætt.

Fastir fúsur í Europa

Fyrst og fremst eru toftamenn skerdir í verjupartnum, har Hans Fróði Hansen hevur leikbann, eftir at hann í seinastu minuttunum av dystinum móti B36 royndi seg sum málverji. Hinvegin er ordiligi málverjin hjá B68, Michal Kokoszanek, við aftur, eftir at hann hevði leikbann ta ferðina.

Gøtumenn eru undan dystinum í eini heldur betri støðu enn toftamenn. Teir hava kanska mist ov nógv, til at gera seg galdandi heilt í oddinum, men við einum sigri sunnudagin halda teir framvegis fast í vónini um eitt pláss millum trý tey fremstu, og harvið enn eitt ár úti í Europa, soleiðis sum teir plaga at gera.

Eftir at bæði Bartal Eliasen og Magni Jarnskor vóru burtur frá við leikbanni seinasta dystin, eru gøtumenninir hesa ferð fullmannaðir, og so verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer at fara.

VB-TB:

Lagnudystur um Suðuroynna

Einasti sigurin hjá TB higartil í kappingarárinum var fyrsti landskappingardysturin á árinum, tá VB vitjaði, og einki er at ivast í, at ósigurin á Sevmýru neit fast hjá vágbingum

Talan kann væl gerast um dyst, sum fær avgerandi týdning fyri niðurflytingarstríðið, tá Vágur og Tvøroyri bresta saman sunnudagin

UPPTAKT
Jákup Mørk

Higartil í ár hava tvorámenn bert vunnið tann eina landskappingardystin. Hetta var júst í grannauppgerðini ímóti VB, og einki er at ivast í, at TB nú ætlar sær ein sigur afturat, soleiðis at sleppast kann nakað burtur frá niðurflytingarvandanum.

Hinvegin er lítið at ivast í, at hjá vágbingunum neit júst hetta tapið sera fast, og ivaleyst var hetta eisini ein týðandi orsøk til, at fyrra kappingarhálva – og harvið kappingarárið - háttaði sær somikið illa, sum tað hevur gjørt.

Tí er lítið at ivast í, at vágbingarnir leggja nógv fyri í grannauppgerðini hesaferð. Eisini hóast hetta kann merkja, at Suðuroyggin verður eitt fyrstudeildarlið fátækari komandi kappingarár.

Í mun til dystin móti HB er VB eisini munandi betri fyri, nú leikbann eru ruddaði burtur, eins og meira ella minni skaddir leikarar eru um at koma fyri seg aftur, so tað verður talan um eitt VB-lið í mest sum sterkastu uppstilling, sum fer á Eiðið sunnudagin.

Í TB skilja tey sjálvsagt álvaran í støðuni, og einki er at ivast í, at eisini teir fara eftir sigrinum sunnudagin. Kanska kann tað eisini vera ein sálarlig barlast hjá TB, at VB seinnu árini hevur staðið seg sera illa í grannauppgerðunum. Tvey ár á rað tryggjaðu sumbingar sær tilveruna í bestu deildini við júst sigrum á VB.

Nakað skerdir eru tvorámenninir tó. Dan Mortensen, sum undir nýggja landsliðsvenjaranum hevur luktað til landsliðshópin, er leikbannaður eftir gult kort seinast, og tað er sjálvsagt ein dyggur smeitur. Hinvegin er Tórður Mortensen tøkur, eftir at hann var leikbannaður seinast.

1. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	NSÍ	14	9	-	3	-	2	29	13	16	30
2	HB	14	9	-	2	-	3	40	17	23	29
3	KÍ	14	9	-	2	-	3	34	16	18	29
4	B36	14	8	-	2	-	4	43	21	22	26
5	GÍ	14	8	-	1	-	5	26	22	4	25
6	B68	14	5	-	5	-	4	20	22	-2	20
7	VB	14	4	-	4	-	6	10	12	-2	16
8	EB/Streymur	14	3	-	2	-	9	16	34	-18	11
9	TB	14	1	-	3	-	10	13	50	-37	6
10	Skála	14	0	-	4	-	10	9	33	-24	4

2. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	FS V	15	11	-	3	-	1	46	9	37	36
2	B36	15	6	-	5	-	4	26	26	0	23
3	KÍ	15	6	-	4	-	5	25	23	2	22
4	Sumba	15	6	-	3	-	6	21	27	-6	21
5	B71	15	5	-	4	-	6	25	18	7	19
6	NSÍ	15	6	-	1	-	8	15	28	-13	19
7	VB	15	6	-	1	-	8	19	39	-20	19
8	ÍF	15	5	-	3	-	7	32	33	-1	18
9	LÍF	15	5	-	3	-	7	24	25	-1	18
10	HB	15	4	-	3	-	8	24	29	-5	15

1. deild kvinnur

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	KÍ	8	8	-	0	-	0	38	6	32	27
2	B36	8	5	-	0	-	3	18	14	4	17
3	B68	7	4	-	0	-	3	13	13	0	13
4	HB	7	2	-	1	-	4	14	13	1	7
5	GÍ	7	2	-	0	-	5	7	25	-18	6
6	Skála	7	0	-	1	-	6	9	28	-19	1

Dystir um vikuskiftið

1. deild menn

15.09	Skála-EB/Streymur	Niklas á Líðarenda
15.09	VB-TB	Suni Johansen
15.09	GÍ-B68	Oddmar Andreasen
15.09	B36-KÍ	Dagfinn Olsen
15.09	NSÍ-HB	Lassin Isaksen

2. deild menn

14.09	B71-KÍ	Regin Egholm
14.09	B36-FSV	Petur Hans Joensen
14.09	Sumba-HB	Jens Petur Brattalíð
14.09	ÍF-VB	Dia Lamhauge
14.09	LÍF-NSÍ	Eiler Rasmussen

3. deild menn

15.09	Royn-AB	Mihi Mathai
15.09	ÍF-TB	Kristoffur Vidtfeldt
15.09	GÍ-B68	Edvard Højgaard
15.09	B36-B71	Ransin N. Djurhuus (verður leiktur á Sandi)
15.09	FSV-HB	Emil Hentze

1. deild kvinnur

15.09	HB-KÍ	Georg Rasmussen
15.09	Skála-B36	Jan Gardar
15.09	GÍ-B68	Kristoffur Vidtfeldt

Piltar – endamumfar, spælt á Eiði
ÍFa, B68a, EB/S, GÍa, NSÍa, Royn

Smápiltar – endaumfar, spælt á Tvøroyri
KÍa, SÍF, HBa, TBa, KÍa, HBa

Smágentur – endaumfar spælt í Fuglafirði
ÍF, KÍa, NSÍ, EB/S

Gentur 10-12 ár, endaumfar spælt í Fuglafirði
ÍF, Skála a, VBa, LÍF

Pinkur – endaumfar spælt á Argjum
ABa, HB, Skála, NSÍa

Tølini tala

Verður sæð burtur frá hagtalsleysa dystinum millum Skála og EB/Streym, tykist talan at gerast um nakrar javnar uppgerðir, tá liðini fara á vøllin sunnudagin. Í øllum førum er tað ikki so, at hagtølini geva nakra greiða ábending um, hvør plagar at vinna dystirnar, men hinvegin eru tað heldur ikki hagtølini, sum gera av, hvussu dystirnir enda. Teir skulu jú spælast fyrst.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu 10 árini.

	'01	'00	'99	'98	'97	'96	'95	'94	'93	'92	Í alt	
Skála-EB/S	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-	0-0-0	0-0
VB-TB	-	-	-	0-0	-	1-0	4-1	-	0-3	0-0	2-2-1	5-4
GÍ-B68	2-0	1-2	3-0	2-2	1-1	2-1	0-2	5-2	1-1	1-1	4-4-2	18-12
B36-KÍ	5-0	1-2	2-0	3-2	2-1	1-1	2-1	0-4	0-1	0-3	5-1-4	16-15
NSÍ-HB	2-1	1-3	0-2	0-4	1-1	-	0-0	4-1	-	0-3	2-2-4	8-15